ALMANNA– OG MENTAMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF SOCIAL AFFAIRS AND CULTURE

Til allar løgtingslimir

4. desember 2023
Mál: 23/17972
Tygara skriv:
Viðgjørt: KÁ

Viðvíkjandi LM-044/2023 : Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagføring av vardum bústøðum (Hækka játtan og leingja sólseturáseting).

Almanna- og mentamálaráðið loyvir sær í sambandi við 2. viðgerð av omanfyrinevnda løgtingsmáli í morgin 5. desember 2023, at koma við fylgjandi viðmerkingum aftrat.

Tá upprunalógin varð løgd fram, var eitt fylgiskjal lagt við, sum vísti, at aftrat dagføringum vildi lógin geva pláss fyri at umleið 25 nýggj pláss verða útvegaði.

Staðfestast má, at yvirlitið, sum varð sent fíggjarnevndini tá, hevði nakrar faktuellar feilir við tað, at nakrar verkætlanir, sum vóru í yvirlitinum vóru byrjaðar áðrenn lógin varð samtykt, eitt nú Eirargarður 14 – 2 og Økisdepilin í Vági. Talið 25 var tí ikki rætt. Rætta talið er 19.

Niðanfyri verður hetta útgreinað nærri.

Pláss útvegað áðrenn lógina:

Stovnur	Ætlað	Útvegað	Viðmerking
Eirargarður 14 – 2	3	3	Verður brúkt til fyribils bústað, tá flutt verður úr einum stað í annað
Økisdepilin í Vági	3	3	
Úrslit	**6**	**6**	

Goldið av játtan (33 mió. kr. játtaðar, uml. 28 mió. kr. eru brúktar):

Stovnur	Ætlað	Útvegað	Viðmerking
Fugloyarvegur í Tórshavn	0	0	
Eirargarður 16 1-2	0	0	
Eirargarður 14 1 Fjálgalon	3		Verkætlan steðgað
Traðarvegur, Sandavági	0	1	
Hóvabrekka á Argjum	0	0	
Blikagøta, Runavík	0	0	
Sundsvegur í Tórshavn	2		Verkætlan steðgað
Stoffalág í Tórshavn	2	1	

Smærugøta í Tórshavn	0	0	
Mýrisólja í Runavík	0		Verkætlan steðgað
Eystan Heyg í Tórshavn	0	0	Verkætlan steðgað
Rúnarvegur í Runavík	3	2	
Grønlandsvegur 59 í Tórshavn	2		Verkætlan steðgað
Grønlandsvegur 63 í Tórshavn	0	4	Ikki við í upprunaligu ætlanini
Ovaragøta í Hoyvík	3		Verkætlan steðgað
Svanga í Tórshavn	0		Verkætlan steðgað
Børkugøta 1 í Tórshavn	0	0	
Bóndaheygur 3 í Tórshavn	2		Verkætlan steðgað
Niðarugøta í Hoyvík	0	0	
Garðsgøta á Argjum		0	Ikki við í upprunaligu ætlanini
Torfingsgøta 1 í Tórshavn		1	Ikki við í upprunaligu ætlanini
Kelduskáki í Klaksvík		0	Ikki við í upprunaligu ætlanini
Úrslit	**19**	**9**	

Uml. 5 mió. kr. eru ikki brúktar av teimum 33 mió.kr., sum upprunaliga er játtað til endamálið.

Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2024 eru 4,5 mió. settar av, í 2025 2 mió. kr. og í 2026 2 mió. kr.

Hetta løgtingslimum til kunningar.

Vinarliga

Kristjan Árnason
fulltrúi